# TILTØK

**Gudstænastur Fríggjakvøldið**
*Glyvra kirkja:* kl. 19.30 Ungdómsgudstænasta, Meinhard Bjartalíð. Ungdómskórið syngur.

**Gudstænastur 3. sunnudag e. Trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11 Jóannis Fonsdal
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Sverri Steinhólm. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina
*Sandavágur:* kl. 11, David Johannesen
*Svínoyar kirkja:* kl. 12 Elsa Funding
*Hvalvík:* kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
*Elduvík:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Glyvrar:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Funningur:* kl. 11, messa,
*Gjógv:* kl. 12.30 messa, Emil Olsen
*Eiði:* kl. 18 Barnagudstænasta (børn syngja) Emil Olsen

**Tiltøk við Hans og Inge**
Fríggjakvøldið 10. juni og leygarkvøldið 11. juni kl. 20 **í Skúlahøllini í Trongisvági.** Øll eru vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ bøn og lovsangi.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Hans Arni Jensen, trúboðari úr Leirvík talar. www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum talar Símun Absalonsen um evnið: »Trúboðarin Jóhannes, Markus« Kl. 11.30 Samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jens Wang um evnið: »Halgan í hjúnabandinum II«. Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.livdin.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður á Parnassinum á Hotel Hafnia leygarkvøldið 11. juni kl. 19.30, allar kvinnur og menn eru vælkomin. Anna av Rana og Lea Poulsen luttaka við vitnisburði.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Fabrizzio Milazzo, prestur í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn fyri samkomuni.
Í morgin kl. 6 Morgunbøn, kl. 20 Flare (grilltrip til Leynar).
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Alex O' Campo (innsavnan til missión), kl. 11.50 Sunnudagsskúli, kl. 22 Útimøti á Vaglinum.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, sunnukvøldið kl. 18 Møti í missiónshúsinum v/ Sigurd Sørensen.

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti, »genta og drongur« v/ Jørmund Foldbo.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli – um viðrar fara vit útferð, verður lýst nærri í Lindini, kl. 18 Møti við teimum ungu, Reimund Langgaard talar, Gratia syngur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
Týskvøldið kl. 20 Møti við Steve Dulwich.
www.gospel.fo

**Frá Ebenezer**
Hósdag kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hósdagin kl. 20 Bíbliutími v/ Jóannes Fonsdal, Vestmanna, evnið: Mika kap. 5.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, Innsavnan fyri Føroysku Sjómansmissiónini.
Kl. 19 Møti v/ Ingu og Signar Dam, Norðasta Horn.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti hjá Signu og Árna.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagsskúli verður kl. 14.30. Møti við Mogens Christensen og Jónhilda og Gulak luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti á Eystanstevnu. Aftaná Awake inni í Kelduni, við Eyðun Jacobsen.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við ymiskari luttøku. Sangur við Byrgerð og Sverra Kjærbæk.
Barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Leygardagin kl. 17 Útimøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Jóhan Henriksen.

**Kalsoy**
Sunnudagin kl. 16 Møti í Mikladals kirkju v/ Øssur Kjølbro og øðrum.

**KFUM & K, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 20.30 venur gospelkórið »Gleðið«.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Café One Way, Tvøroyri**
Tiltøk við Hans og Inge Berntsen verða í Skúlahøllini í Trongisvági fríggjakvøldið **10. juni**, Theodor Petersen luttekur við sangi og tónleiki.
Leygarkvøldið **11. juni** kl. 20 í Skúlahøllini í Trongisvági – Suðuroyar Gospelkór og Theodor Petersen luttaka. Øll eru vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í Frelsunarherinum í Vági hósdagin 9. juni kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, majorarnir Elisabeth og Sámaj J. Joensen tala. Øll eru vælkomin.

**Føroysk møtir í Danmark**
Evangel. møti fríggjakvøldið 10. juni kl. 19.30 í Sædding Center í Esbjerg.
Evangel. møti í Skolehjemmet á Søndre Landevej 28 í Sønderborg leygarkvøldið kl. 19. Og sunnudagin 12. juni kl. 10.00 verður breyðbróting.
Sunnudagin kl. 17 Evangel. møti í hølunum hjá Frelsens Hær í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Poul Johan Djurhuus o.a. Aftaná bjóða vit ein drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 6. juni:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, dart og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491.
*Týsdagur 7. juni:*
kl. 10-11.30 Sangur – Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-16 Felagssangur við starvsfólk á býráðnum
*Mikudagur 8. juni:*
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
*Hósdagur 9. juni:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagur 10. juni:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 12. juni gongutúrur, Vesturdalsá-Skálafjall-Undir Halgafelli og oman til Oyrar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og ein matpakka við. Túrurin er langur og miðal tungur. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagur 6. juni***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest.
***Týsdagur 7. juni***
Boccia
***Mikudagur 8. juni***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok
***Hósdagur 9. juni***
Útferð vestur í Vágar. Vit møtast í Fløvanum kl. 10.00.
***Fríggjadagur 10. juni***
Opið hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

## Brúdleyp

Leygardagin 11. juni kl. 12.00 giftast í heimi okkara í Vestmanna Hildbert Blástein, Vestmanna og Rannvá Sørensen, Viðareiði. Eftir vígsluna verður høvi at heilsa uppá brúðarparið til kl. 15.30.

Leygardagin 11. juni kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Teresa Magnusen úr Lamba og Magnus Djurhuus Joensen av Nesi. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17.00 og opið hús frá kl. 20.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 11. juni kl. 11.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Ann Poulsen og Edmund Jacobsen, Toftir. Aftaná vígsluna verður móttøka í B68-húsinum. Øll eru vælkomin.

Leygardagin 18. juni kl. 14.00 giftast í Sandavágs kirkju Sigrid Hammer, Hvalba og Jón Edvard Petersen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Vágum og opið hús verður í heiminum, Sóljuteigur 2 í Sandavági frá kl. 20.00.

Leygardagin 25. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreth Olsen, Argir og Hildibrandur Olsen, Tórshavn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 210756 ella 210755 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 25. juni kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Katrin á Mýrini og Kári Næss Ramussen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317022/243532 ella 222369 innan 11. juni.

Leygardagin 2. juli giftast í Christianskirkjuni Dania Ragnarsson og Terji Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319125, 455950 ella 275180 áðrenn 15. juni.

Leygardagin 9. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Ritha Holm og Eyðun Midjord. Veitslan verður fyri innbodnum í Royn-høllini kl. 19.00.

22. juli kl. 17.00 giftast í Nólsoyar kirkju Anne Mette Greve Klemensen úr Rødding og Leif Hansen úr Nólsoy. Eftir vígsluna verður vælkomst á Alistøðini. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin at siga frá á tlf. 327061 ella 327002 ella á annemette@mpiri.org innan 10. juli

Leygardagin 23. juli kl. 14.00 giftast í Skála kirkju, Heidi Magnusdóttir Hansen, Hellur og Svenn Harry Johansen, Saltangará. Veitslan verður í Ítróttarhøllini á Skála kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin um at siga frá á tlf. 258407 ella 222567 innan 2. juli.

Leygardagin 23. juli kl. 13.30 giftast í Kristianskirkjuni í Klaksvík Esther Nattestad og Jón Hardy Vibjørg. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin til nátturða kl. 20.00 heima hjá teimum **Undir Fossum 50.** Vinarliga sigið frá áðrenn 17. juli á tlf. 457919.

## Silvurbrúdleyp

Týsdagin 14. juni hava hjúnini Maria Eiriksdóttir og Jógvan Fríðriksson silvurbrúdleyp. Kl. 17.00 verður guðstænasta við altargongd í Skála kirkju. Opið hús er á Gjaranesi um dagin og alt kvøldið.

14. juni kunnu hjúnini Anna Petra og Karlon Winther í Havn halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 19. juni, við buffet í Róðrarneystinum á Argjum frá kl. 10.30-16.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 213777, 310332 ella 361357 innan 9. juni.

Mánadagin 4. juli hava Edith og Fredag Kambsenni verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. juni á tlf. 455197 ella 451182.

Leygardagin 9. juli kl. 19.00 hava vit eina hugnaløtu í bygdarhúsinum í Leirvík í samband við silvurbrúdleyp okkara. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá innan 1. juli á tlf. 457141 ella 0047 57720633. Verið vælkomin.
**Anita og Svenning í Liða**

## 80 og 85 ár

Tann 9. og 12. juni verða hjúnini Solveig og Haakon Joensen, Dalagøta 9, Tórshavn 80 og 85 ár. Í hesum sambandi verður opið hús fríggjadagin 10. juni hjá dóttrini Sigrun, Varðagøta 59 frá kl. 14.00 til kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

## 90 ár

Sunnudagin 12. juni verður Elias Jacobsen, Syðrugøta – vanliga nevndur Lias hjá Benadikt – 90 ár. Tey, sum ynskja at heilsa uppá Lias eru vælkomin í eldrasambýlið Gøtubrá, sunnudagin millum kl. 15.00 og 18.00.